


**Nr. 19** *14. septembur 2025* **85. árg.**

# Maðurin, sum orkaði alt

Einaferð fyri mongum árum síðani var tað ein maður, sum reisti seg upp at vitna á einum møti. Hetta var í Amerika.

„Eg orki alt!“ segði hann.

Øll inni í salinum vendu sær á at hyggja at hesum manni. Tað er ikki hvønn dag, at tú sært eitt menniskja, sum orkar alt. Hvussu sær ein sovorðin sjáldsamur persónur út? Hetta var jú áhugavert! Onnur hugsaðu við sær: „Orkar alt! Eg kann ikki ætla! Hann man vera ein ordans reypari!“

Men tað førdi ið hvussu er tað við sær, at eingin sat og hálvsvav á møtinum. Tey vóru øll klárvakin og sera spent uppá, hvat ið maðurin nú mundi fara at siga.

„Ja, eg orki alt,“ tók maðurin uppaftur, men so helt hann fram, „í honum, sum ger meg sterkan.“ Hatta er eitt skriftstað, sum stendur í Filippibrævinum í 4. kapitli og 13. versi. „Ja, eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan.“ Og tað er nakað heilt annað. Í okkum sjálvum megna vit ikki nógv, men tá ið vit kenna hann, sum kann gera okkum sterk, so vita vit, hvar ið vit skulu venda okkum, tá ið kreftirnar ganga undan.

Maðurin greiddi so frá, at hann misti arbeiði. Tað er ein heil vanlukka fyri ein familjumann. Í fyrstuni helt hann, at hann mundi fara at klára seg, tí hann fór helst at fáa okkurt arbeiði heilt skjótt. Hann søkti starv her og har; men einki bar til. Rokningarnar streymaðu inn, og hann átti einki at gjalda við. Hann var illa sperdur. At enda sá hann, at Harrin var hin einasti, sum kundi hjálpa sær.

Hann fall niður á síni knø og útoysti sítt hjarta fyri Gudi og segði: „Harri, tú mást hjálpa mær. Eg eri í dýrastu neyð.

Rokningarnar streyma inn, og eg eigi einki at gjalda við. Eg blívi sjúkur, tá ið eg ikki kann gjalda hvørjum sítt. Eg má sleppa av við mína skuld. Harri, gev mær eitt arbeiði."

Morgunin eftir fekk hann tað soleiðis, at hann skuldi fara yvir til eina byggifyritøku. Hann fór beint inn til stjóran. „Góðan morgun," segði hann, „hava tit ikki brúk fyri einum røskum manni?"

„Jú, vit standa júst og mangla ein mann. Tú kanst byrja longu í morgin," svaraði stjórin. Maðurin takkaði so hjartaliga og ætlaði sær at fara; men stjórin segði: „Bíða mær eitt sindur. Eg skal rokna løn tína út." Stjórin nevndi so eitt tal. Tað var dupult so nógv, sum maðurin hevði fingið á gamla arbeiðsplássi sínum. Hann fór glaður avstað, og hann mátti sanna, at tað loysir seg at søkja Gud. Hví hevði hann ikki gjørt tað fyrr? Her fekk hann eitt arbeiði fyrstu ferð, hann royndi, og lønin var heilt ómetaliga góð.

Morgunin eftir var hann sera spentur, tá ið hann kom oman á byggifyritøkuna. Formaðurin kom yvir til hansara og vísti honum til rættis. „Tú skalt taka eina jarnplátu av hasum stáplinum har og bera hana upp gjøgnum hatta stillasið og geva manninum, sum stendur ovast uppi hana." Í dag hava teir snildari mátar at fáa tilfar upp í tær hægru hæddirnar; men fyrr mátti alt dragsast við hond.

Maðurin fór við miklum treysti undir hetta arbeiðið. Hann helt, at tað var einki fyri, hatta fór hann at megna sum einki. Men hann var bara komin upp í hálvt stillasið, tá ið hann kendi seg øgiliga móðan. Beinini ristust undir honum, og hann helt eisini, at plátan var í so tung. So hugdi hann niður, og tá var heilt galið. Hann helt, at tað var so ómetaliga langt niður í túnið, og fólkini vóru so ógvuliga smá. Tað fór at mala fyri honum.

„Lat vera við at hyggja niður," skeldaði hann inn á seg sjálvan, „hygg uppeftir. Minst til Pætur! Tá ið hann hugdi niður, sakk hann; men so leingi sum hann hugdi upp á Jesus, fekk hann gingið á vatninum!"

Hann togaði seg eini tvey trin upp í stigan afturat; men so orkaði hann ikki meir. „Harri, kom og hjálp mær," bað hann, „eg orki ikki meir, og eg kann ikki siga hetta starvið frá mær, tí mær tørvar pengarnar."

Í somu løtu, hann hevði biðið hasa bønina, kom eitt skriftstað inn í hugan á honum: „Ja, eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan.“ Her var hjálpin. Men hvat gert tú heilt ítøkiliga fyri at fáa nyttu úr hesum bíbliuorðinum?

Maðurin treiv fastari um plátuna, steig eitt trin upp og segði hart: „Eg.“ So steig hann eitt trin afturat og segði: „Orki.“ Síðani traðkaði hann á triðja trinið og segði: „Alt.“ Og soleiðis helt hann áfram. Hvørja ferð, hann steig eitt trin, segði hann hart fram fyri seg eitt orð úr hesum skriftstaðnum. Tá ið hann var liðugur at siga skriftstaðið, var hann komin níggju stig upp. Hann byrjaði so av nýggjum og helt so áfram á sama hátt, og at enda kom hann upp á ovasta pallin og kundi geva manninum har jarnplátuna. Soleiðis gekk allur dagurin. Um kvøldið kundi hann fara til hús og hvíla sín móða kropp. Tá ið fjúrtan dagar vóru farnir, merkti maðurin, at vøddarnir í beinunum vóru styrknaðir, tí hann ristist ikki so illa sum fyrr. Eisini kendust pláturnar ikki so tungar longur.

Bíblian sigur, at trúgvin kemur av tí, sum verður hoyrt (Róm. 10,17). Tað liggur ein sannleiki í hesum. Vit skulu siga hesi orð hart og leggja tey á goymslu uppi í heilanum. Tá gerast tey ein veruleiki í lívi okkara. Soleiðis fekk hesin maðurin hjálp, og soleiðis kunnu tú og eg fáa hjálp. Latið okkum ikki gloyma at geva Gudi æruna og takka honum fyri alla hjálp og fyri Bíbliuna, sum er ein sonn skattakista.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tænandi andar

Ein kona var gestur í Visjon Norge. Hon greiddi frá, at hon livdi við Jesusi í gerandisdegnum. Hon kom við einum dømi, sum hon hevði upplivað í vikuni:

Hon hevði mist lykilin burtur, onkustaðni millum húsini og bilin. Hon leitaði allastaðni, men fann hann ikki.

So fór hon at biðja: „Harri, skrivað stendur í Hebr. 1,14: Eru teir, einglarnir, ikki allir TÆNANDI ANDAR, sum verða útsendir til hjálpar teirra vegna, sum skulu arva frelsu. Harri send mær ein eingil og lat hann leggja lykilin, so at eg síggi hann.“

So læt hon eyguni upp, og tá sá hon okkurt skyggja í grasinum, og tað var lykilin!

*Effie Campbell.*

# Hini týdningarmiklastu boðini

Neerskov greiddi einaferð frá, at hann ein dagin stóð saman við einum vinmanni í Leningrad og bíðaði eftir einum bussi. Hetta var í kommunistatíðini. Tá kom ein maður yvir til teirra og spurdi um okkurt á russiskum. Vinmaður Neerskovs tosaði nakrar minuttir við hann, og so fór maðurin.

„Hvat spurdi hann um?“ vildi Neerskov vita.

„Hann spurdi, hvønn buss hann skuldi taka fyri at koma yvir í hin endan av býnum. Tað segði eg honum so; men so segði eg honum nakað, sum er av størri týdningi enn at finna bussar.“

„Hvat var tað?“ spurdi Neerskov eitt sindur bangin.

„Eg segði honum, at Gud hevði sent son sín Jesus Kristus til frelsu fyri menniskju.“

Neerskov bleiv heilt bangin og leit seg íkring, um maðurin nú mundi koma aftur við politinum. „Hvussu kundi tú funnið uppá at tosað so bart út við ein fremmandan mann her mitt úti á gøtuni? Veitst tú ikki, hvussu vandamikið tað er? Tað kann kosta fleiri ár í fongsli!“

„Veitst tú ikki, hvussu vandamikið tað er fyri hann?“ spurdi hann kvikliga, „um hann ongantíð hoyrir evangeliið, so verður hann æviga glataður.“

Tá skammaðist Neerskov; men vinmaðurin helt rólig áfram: „Teir kunnu seta meg í fongsul, tað hava teir gjørt fyrr. Men hvat hevur tað at týða? Tað eru bert nøkur fá ár sammett við ævinleikan. Eg havi, ið hvussu er, gjørt av, at eg vil bera tey týdningarmestu boðini til eitt og hvørt menniskja, sum eg komi í samband við, nevniliga, at tað er frelsa í Jesusi Kristi.“

Hvussu er við tær og mær, eru vit líka ágrýtin, vit, sum búgva í einum landi, har tað ikki kostar fongsul at boða orðið?

*Effie Campbell.*

---

Við Jesusi kemur altíð ein nýggjur morgun. Gev tí Kristusi lív títt.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 14. sept. | **Tekstur:** | 1. Mós. 3,1–13 + 23–24 | **Bíbliuorð:** | Róm. 7,19 |
| 21. sept. | **Tekstur:** | 1. Mós. 1,1–2,4 | **Bíbliuorð:** | Sl. 33,6 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 20** ***28. septembur 2025*** **85. árg.**

# Fimm týdningarmikil svør

*„Er Gud við okkum, hvør er tá ímót okkum?" Róm. 8,31.*

**Paulus setir fimm týdningarmiklar spurningar:**

1) ***„Er Gud við okkum, hvør er tá ímót okkum?"*** Vissan um Guds nærveru gevur tær allar fyrimunir. So uttan mun til, hvat ið tú stríðist við í dag, kanst tú minna teg sjálva á, at Gud er við tær.

2) ***„Hann, sum ikki spardi sín egna son, men gav hann upp fyri okkum øll, hví skuldi hann ikki eisini geva okkum alt við honum?"*** (vers 32). Hugsa um tað: Vildi Gud fyrst frelsa sál tína og síðani sleppa tær upp á fjall? Ella vildi hann tikið sær av tínum æviga tørvi og ikki av tínum jarðisku? Nei!

3) ***„Hvør vil ásaka Guds útvaldu?"*** (vers 33). Eingin – tí Gud hevur sjálvur givið okkum rætt at líta á Hann. Eingin ákærandi rødd, heldur ikki tín egna, verður roknað fyri nakað við hin himmalska dómstólin. Guds góðkenning ber av øllum, hon stígur langt upp um tað, at onnur eru ólagalig og havna okkum – Hann góðkennir teg, av tí at Hann sær teg „í Kristusi".

4) ***„Hvør er tann, sum fordømir?"*** ... Kristus Jesus er tann, sum deyður er, og meira enn tað, er risin upp frá deyðum, hann sum er við høgru hond Guds, hann sum eisini gongur í forbøn fyri okkum." (vers 34). Tá ið tey, sum ákæra teg, reisast og tala ímóti tær, vil Jesus, tín verjuadvokatur, fáa tey at tiga. Hví? Tí blóð hansara fjalir teg!

5) ***„Hvør kann skilja okkum frá kærleika Krists?"*** (vers 35). Paulus svarar sjálvur egna spurningi sínum: „Tí at eg eri fullvísur í tí, at hvørki deyði ella lív, hvørki einglar ella

harradømi, hvørki tað, sum nú er, ella tað, sum koma skal, ella kreftur, hvørki hædd ella dýpd ella nakar annar skapningur skal kunna skilja okkum frá kærleika Guds í Kristi Jesusi, harra okkara.“ (vers 38–39).

Kunnleiki til hesar fimm sannleikarnar vil hjálpa tær uppaftur meira at njóta tín dag og at sova betri um náttina!

*„... et Ord til Dagen“ – Effie Campbell umsetti.*

# Um tú ert til, Gud, so...

**Ein maður vitnaði niðri á Blákrosskaféini nú eitt kvøldið:** Eg búði nokk so nógv ár í Íslandi, og eg var illa fyri, tí eg var so bundin av ymiskum, serliga av hassji, alkoholi og ymiskum rúsevnum. Eg var í dýrastu neyð, tí eg vildi sleppa av við alt hetta, sum bant meg niður, og eg royndi ymiskt. Eg fór til avvenjingar. Tað hjálpti eina tíð; men so datt eg útí aftur. At enda var eg so móður, so móður, at eg orkaði snøgt sagt ikki meir.

Eg fór til eina lítla bygd, sum lá langt har frá, sum eg búði. Tá ið eg kom hagar, fór eg oman á bryggjuna, og eg ætlaði mær at leypa útav. Eg snaraði mær á. Har var ikki eitt menniskja. So lyfti eg hondina upp móti himli og segði: „Um tú ert til, Gud, hjálp mær so!!!“

Í somu løtu sendi Gud ein tanka niður í meg. Hann segði, at eg skuldi fara niðan til eini ávís hús har í bygdini. Hann segði einki annað enn tað. Húsini vóru lítil og gomul. Eg hevði ongantíð verið har fyrr; men eg visti, at húsfólkini vóru trúgvandi. Eg bankaði uppá og kvíddi fyri, hvat ið eg skuldi siga, tá ið tey lótu upp. Men tey vóru so hjartans blíð og ynsktu mær vælkomnum og søgdu: „Kom inn, kom inn!“

Tað vísti seg, at tey høvdu biðið fyri mær í eina tíð, og nú kom bønarsvarið. Eg fall á knæ og varð frelstur og loystur, og eg fekk ein undurfullan frið inn í mítt hjarta. Tey søgdu við meg, at eg kundi búgva hjá teimum so leingi, sum eg vildi. Eg búði har í tríggjar mánaðir. Íbúðin var lítil, tey høvdu bara eitt kamar og so eitt pinkalítið afturat. Tey flutt inn í tað lítla kamarið saman við sínum trimum smábørnum, og mær góvu tey sítt kamar. Hetta vóru av sonnum gudsóttandi fólk, sum livdu út sín kristindóm.

Tá ið eg bað Gud frelsa meg, bað eg hann um eitt afturat: „Góði Gud, gev mær eina konu. Hon skal vera trúgvandi og úr Føroyum.“ Og Gud hoyrdi ta bønina. Hann sendi mær konuna upp til Íslands, og vit giftust. Nú hava vit verið gift í 22 ár. Eg eri Gudi so takksamur fyri mína konu. Eg eigi ikki orð fyri, hvussu góða konu eg havi.

Eg takki og lovi Gudi fyri hansara stóru náði og góðsku móti mær og mínum.

*Effie Campbell.*

# Maran ata!

Vit liva hinumegin krossin og fullgjørda verkið. Vit hava hoyrt hin upprisna Kristus siga okkum, hvørji **tekn** og **hendingar** skulu siga okkum, at **Jesu koma er nær**. Vit hava í Luk. 21,28 hoyrt hann siga: „**Tá ið hetta fer at henda**, tá rættið ryggin og lyftið høvdum tykkara, **tá verða tit skjótt fríað**.“ N.S.

Vit hava hoyrt Jesus siga: „Á sama hátt skulu tit eisini vita, **tá ið tit síggja hetta henda**, at Guds ríki er í nánd. Sanniliga sigi eg tykkum: henda slekt skal als ikki forganga, áðrenn alt samalt er hent. Himin og heimur skulu ganga undir, men orð míni skulu als ikki forganga.“ (Luk. 21,31–33).

Nóa sá einki tekn, men hann trúði! Vit síggja øll teknini rulla inn yvir okkum – sum verkirnir hjá konu, sum er komin á soppin!

Men trúgva vit? Eru vit ovurfegin? Siga vit øðrum frá um Frelsaran? Gleða vit okkum til komu Jesusar? Eru vit til reiðar til burturrykkingina? Tí hon kemur uttan fyriboðan.

Eg sigi: „Maran ata!“ (1. Kor. 16,22). Tað merkir: „Kom, Harri Jesus!“ (Opb. 22,20).

*Effie Campbell* umsetti.

# Hann talar til tín

Ein námsarbeiðsmaður lá í andaleypi í song síni uppi í fjøllunum í Kalifornia. Ein trúgvandi kona las fyri honum úr Jóhs. ev. 3,16: „Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.“

Tá læt hann eyguni upp og hugdi upp á hana og spurdi: „Stendur hatta í Bíbliuni?“

„Ja,“ svaraði hon.

„Er hatta meint við meg?“ spurdi hann aftur.

„Púra vist,“ svaraði konan, „tað er meint við teg.“

Hann lá kvirrur eina løtu, og so spurdi hann: „Hevur hann sagt okkurt annað?“

Hon las víðari frá Jóhs. ev. 1,12: „Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn.“ So legði hon afturat: „Hann talar við teg.“

Maðurin læt eyguni upp og teskaði aftur: „Eg taki ímóti honum. Eg eri frelstur.“ Og so doyði hann.

*T. L. Osborn. – E. Campbell* umsetti.

# Bað um eina trúgvandi konu

*Emanuel Minos*

Á døgum Elia var bara ein sannur Guds profetur, bara ein! Men har vóru 450 Báalsprofetar og 450 Ásjerjuprofetar. Í summum norðurlendskum umsetingum verður Ásjerja nevnd Astarte, tað er sama navnið. Tað merkir, at har vóru 900 falskir profetar. Eg skal ikki koma nærri inn á Báals dýrkanina, tí at nógv av tí er ikki borðbart; men eg skal bara nevna, at eingir reinir ungdómar vóru tá. Tú ungi, sel ikki tín reinleika fyri eina stutta syndanjóting. Vend tær frá syndini, sum stjelur tína eydnu og framtíð. Vend tær til Jesus, sum lekir tíni sár.

Tað løgna við Astarte er, at teir profetarnir eru í øllum Norðurlondum í dag. Tí Astarte er tað sama sum astrologi, og stjørnuspádómar kanst tú lesa í hvørjum vikublaði, spyr bara konufólkini! Og hugsa tær, fólk trúgva enntá upp á tað, sum stendur har, t.d. at nú fert tú at fáa ein maka.

Men eg trúgvi ikki upp á stjørnurnar. Eg trúgvi upp á Jesus. Eg bað Jesus geva mær eina trúgvandi konu, og í 2014 hava vit verið gift í 60 ár, eg og Åse, sum var tann trúgvandi konan, ið Jesus gav mær.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Gandhi:** Friður er ein vegur, sum tú mást ganga eftir, tú kanst ikki keypa teg til friðin.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 28. sept. | **Tekstur:** Luk. 1,26–38; Matt. 3,17 | **Bíbliuorð:** Luk. 2,11 |
| 5. okt. | **Tekstur:** Mark. 15,1–15 + 33–39; 16,6–7 | **Bíbliuorð:** Jóh. 3,16 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74